# Fiskaborð til frama fyri eldrasambýli

**Alt gott úr sjónum, undirhald, sangur og dansur. Hetta er á skránni, tá Vágs Matmøðrafelag leygarkvøldið skipar fyri hugnaløtu við fiskaborði. Alt verður gjørt fyri at vinna pening til eldrasambýlið, so farast kann undir 2. byggistig**



*Eldrasambýlið í Vági. Farið verður nú undir at savna pening til 2. byggistig og í hesum sambandi verður leygarkvøldið skipað fyri hugnakvøldi við fiskaborði, sangi og dansi*

ELDRABÝLI
*Dagfinn Olsen*

Vágs Kommuna hevur reist eitt prýðiligt eldrasambýli. Men tørvurin er stórur og møguleikar hava alla tíðina verið fyri víðari útbygging av eldrasambýlinum, ið hýsur 12 fólkum.

Tá farið varð undir at arbeiða við ætlanum um eldrasambýlið, var Vágs Matmøðrafelag ein høvuðsstuðul og skipaði fyri mongum tiltøkum fyri at savna pening.

### Fiskaborð, Jóan Petur og hugni

Og nú er felagið aftur farið til verka, so peningur kann savnast til 2. byggistig.

Leygarkvøldið verður skipað fyri hugnakvøldið í VB-húsinum. Byrjað verður við fiskasuppu og á matarlepanum eru síðani ein hópur av rættum úr bókini "Góður matur úr sjónum", ið kom út fyri jól. Gestakokkurin kemur úr Skalavík. Hann nevnist Jóan Petur og er kendur sum Okkara Kokkur úr Svf.

### Gita ein sang

Felagssangur verður undir borðhaldinum við hópi av gomlum sjómansvísum, kærleikssangum og gomlum slagarum.

Ymsar kappingar verða til undirhalds. Spurnarkapping millum borðini og kappingin Gita ein sang. Eisini annað undirhald verður og burturluting.

Farið verður uppá gólv saman við Jómsvíkingum og sumbingum. Til dansin aftaná leikar Skák.

Vágs Matmøðrafelag skipar fyri kvøldinum. Felagið er farið undir at savna inn pening til 2. byggistig av Eldrasambýlinum, ið Matmøðrafelagið var saman við Vágs Býráð um at byggja.

Hugnakvøldið byrjar klokkan 20 og kostnaðurin er 150 krónur.

Tekningarlistar liggja á Shell, Statoil og Suðuroyar Heimavirki. Seinasta freist at tekna seg er 24. januar.

## Virkin í stríðnum ímóti HIV

**Millum tríggir og fimm norðurlendingar fyri hvørjar 100.000 íbúgvar verða smittaðir við HIV um árið. Samsvarandi verða 115 russar smittaðir fyri hvørjar 100.000 íbúgvar**

HEILSA
*Turið Kjølbro*

Tøli, ið vísa, hvussu nógv vórðu smittað við HIV í fjør, eru ymisk fyri norðurlond. Tølini liggja úr sløk trý til sløk fimm fyri hvørjar 100.000 íbúgvar. Hóast hagtøl fyri heilsu skulu takast við ávísum fyrivarni, tí ymsir mátar eru at gera upp, liggja tølini fyri nýggj HIV-smittað væl hægri í londum, ið eru grannar til norðurlond, eitt nú Letland, Estland og Russland. Í Sænkta Pætursborg vórðu 5.470 nýggj HIV-smittað skrásett í fjør, svarandi til 115 fyri hvørji 100.000. Tískil verður mett, at tað er skilagott, at norðurlond hvør í sínum lagi og saman ígjøgnum Norðurlendska Ráðharraráðið eru virkin í stríðnum ímóti smittusjúkum í baltalondum og Russlandi. Ein frágreiðing, sum eitur Infectious Disease Control in the Barents and Baltic Sea Regions 1998-2001, sigur frá átjan stuttum skeiðum við 642 luttakarum og trimum longri skeiðnum við 89 luttakarum fyri fakfólk úr Eystursjóvarøkinum. Fíggjarætlanin til hetta endamál á 8,9 mió. danskar krónur er fíggjað av eini játtan, Norðurlendska Ráðharraráðið letur til arbeiði innan nærumhvørvi. Verkætlanin hevur ført til eitt gott netverk millum miðstøðir fyri smittueftirlit í norðurlondum og baltalondum umframt Norðurvesturrusslandi. Arbeiðið heldur fram, men er nú serliga miðað eftir Norðurvesturrusslandi.

## Svensk børn best fyri

**Svøríki er tað landið í heiminum, har børn hava bestan møguleika at yvirliva**



*99,7 prosent av gentunum og 99,5 prosent av dreingjum í Svørík gerast eldri enn 5 ár.*
*Savnsmynd*

HEILSA
*Turið Kjølbro*

Svøríki er tað landið í heiminum, har børn hava bestan møguleika at yvirliva. Í hagtølum frá Heimsheilsustovninum WHO verður nevniliga staðfest, at møguleikin hjá einum smábarni at gerast eldri enn fimm ár, er størstur í Svøríki. 99,7 prosent av gentunum og 99,5 prosent av dreingjum liva so leingi. Munurin á londunum, sum hava lægst deyðstíttleika millum smábørn, er kortini sera lítil. Í hølunum á Svøríki koma Noreg og Ísland. Hesi lond hava sama títtleika sum Svøríki, tá ið ræður um hagtølini fyri dreingir, og tá ið ræður um genturnar, er Noreg tætt við Svøríki.

USA hinvegin hevur tvífalt so stóran smábarna deyðstíttleika sum Svøríki. Í Russlandi er stigið fýra ferðir so høgt og í Kina tíggju ferðir so høgt sum svensku tølini. Í Portugal er deyðstíttleikin tvífalt so høgur sum í Svøríki.

## Matvøruketan bøtast

MATPOLITIKKUR
*Turið Kjølbro*

Brúkararnir skulu hava størri ávirkan á matpolitikkin í Noregi. Lars Sponheim, landbúnaðarmálaráðharri í Noregi, hevur gjørt av, at spyrja brúkarar og áhugafelagsskapir til ráðs, áðrenn lóg verður samtykt í Norðurlendska Ráðharraráðnum um matvørur.

– Norðurlond hava tørv á at draga brúkararnar meiri uppí, tá ið tað snýr seg um matpolitikk. Samskiftið ímillum framleiðarar, brúkarar og myndugleikar skal gerast betri, segði Lars Sponheim, tá hann hitti samstarvsfelagar úr hinum norðurlondunum á fundi í Norðurlendska Ráðharraráðnum í Oslo.

Arbeiðið við at gera eina norðurlendska ætlan fyri øktan matvørutryggleika í Norðurlondum er farið í gongd. Hendan skal leggjast fram á ráðharrafundi í august í ár, tað vil siga á fundi millum norðurlendskar fiski- og landbúnaðarmálaráðharrar.

– Matvørutryggleikin skal økjast allan vegin ígjøgnum ketuna, frá landi til sjós, segði Lars Sponheim.

Tað er ongantíð hent áður:

# Nú fiska vit lodnu í føroyskum sjógvi!

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Fyri fyrstu ferð í okkara fiskivinnusøgu fiska føroysk skip nú lodnu í føroyskum sjógvi.

Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, sigur, at hetta er ongantíð hent áður – ikki tað, hann veit um í hvussu er.

- Vit fáa við hvørt lodnuyngul undir Føroyum, men vit vita ikki um, at vaksin-lodna áður er fingin í føroyskum sjógvi, sigur hann.

bóru við lodnuna vestur móti markinum til Íslands. Hetta hendi stutt fyri vikuskiftið.

Hjalti veit at siga, at Christian í Grótinum er um at verða fullur, og tvey onnur føroysk skip, Tróndur í Gøtu og Krúnborg, sum eisini hava verið á svartkjaftaveiði, eru á veg vestureftir at fiska lodnu í føroyskum sjógvi.

Nú veðrið øtlaði, tarnar tað fiskiskapinum. Men spennandi verður at frætta, hvussu hesin søguligi fiskiskapur fer at roynast.



*Christian í Grótinum, sum fann lodnuna, er um at verða fullur, og tvey onnur føroysk skip, Tróndur í Gøtu og Krúnborg, sum eisini hava verið á svartkjaftaveiði, eru á veg vestueftir at fiska lodnu í føroyskum sjógvi. – Hetta er søguligt, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni*

### Skip á veg

Tað var, meðan Christian í Grótinum fiskaði svartkjaft í føroyskum sjógvi, at teir

### Nógv lodna

- Eg havi tosað við íslendingar. Teir siga, at nógv lodna er til í ár, og at teir hava sæð heilt fitt av lodnu móti okkara fiskimarki.

Hjalti heldur, at orsøkin til, at lodna í ár er komin í føroyskan sjógv, er, at streymurin, har lodnan er í løtuni, gongur hart ímóti okkum, og tí kemur hon hendanvegin.

- Hetta er ivaleyst lodna, sum er á veg á Suðurlandið at gýta. Hon fylgir markinum millum kalda og heita sjógvin og er so komin suður ímóti okkum, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

Háldan Haldansen, Farita, Haldórsvík:

# Gekk betur, enn vit væntaðu

**Síðan Víkarvirkið, sum tað í sínari tíð kallaðist, læt aftur fyri fleiri árum síðan, hevur gingið aftur og fram við fiskaarbeiði í Haldórsvík. Ymiskar royndir hava verið gjørdar at skapa arbeiði í bygdini, men tær hava ikki verið varandi.Nú bendir so alt á, at virksemið hjá Háldani Haldansen og Hjørleifi Dahl er komið í eina trygga legu og kunnu fólk í økinum vænta, at arbeiði verður varandi.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Síðan vestmenningurin, Háldan Haldansen og norðskálamaðurin, Hjørleif Dahl, keyptu fiskavirkið í Haldórsvík, hava teir nútímansgjørt virkið, soleiðis at tað í dag er væl útbygt og hevur eina lutfalsliga stóra framleiðsluorku.Talan er um tveir bygningar, sum nú eru gjørdir til eitt virki.

Flakaskeringin fer fram í øðrum bygninginum, sum áður var flakavirki og pakkingini í hinum, tí gamla saltfiskahúsinum.

- Nógv hevur verið at gjørt við virkið, og hetta hevur verið kostnaðarmikið, men nú eru vit komnir undir land. Onkrar ábøtur skulu gerast uttan, men tað er ikki tað, sum kostar teir nógvu pengarnar, sigur Háldan.

### Betri enn væntað

Virksemið hjá Farita, sum felagið hjá Háldani og Hjørleifi eitur, fór so líðandi í gongd í Haldórsvík, 23. mars síðsta ár,

- Vit byrjaðu spakuliga við at keypa og útflyta feskan fisk, og fáar vikurseinni fóru vit í holt við at virka saltfisk. Tá ið vit høvdu arbeitt ein góðan mánaða, rendu vit okkum beint í verkfallið á arbeiðsmarknaðinum — og so høvdu vit aftur frí í ein mánaða.

Háldan sigur, at síðan verkfallið varð avblást, hevur arbeiði á virkinum verið rættiliga støðugt, og bert onkur hendinga dagur er dottin burtur ímillum. Men teir hava ikki verið nógvir.

25 fólk arbeiða hjá Farita, og tey flestu eru úr Haldórsvík, Tjørnuvík og úr Sundalagnum annars.

Síðan Víkarvirkið, sum tað í sínari tíð kallaðist, læt aftur fyri fleiri árum síðan, hevur gingið aftur og fram við fiskaarbeiði í Haldórsvík. Ymiskar royndir hava verið gjørdar at skapa arbeiði í bygdini, men tær hava ikki verið varandi.

Nú bendir so alt á, at virksemið hjá Háldani og Hjørleifi er komið í eina trygga legu og kunnu fólk í økinum vænta, at arbeiði verður varandi.

- Her var ein møguleiki, og eg og Hjørleif tóku okkum saman og keyptu virkið.

Háldan sigur, at teir eru hampiliga væl nøgdir við gongdina síðsta ár.- Tað gekk heldur betur, enn vit væntaðu, sigur hann.

### Saltfiskur og feskt

Farita hevur lagt seg eftir at virka saltfisk. Nakað verður eisini útflutt av feskum fiski, og hetta er so eitt íkast. Heili fiskurin, sum fer av landinum, er smá hýsa, sum fer til Bretlands. Farita útflytir bara feskt, tá ið marknaður er fyri hesum, og tað er skiftandi við marknaðinum av feskum fiski.Háldan sigur, at teir hava lagt seg eftir at salta tosk, brosmu og longu.

- Alt, sum verður saltað, verður skorið til flak. Vit flekja ikki sum er, men hava møguleikar til tess. Vit framleiða tað, sum okkara keyparar vilja hava, og í ár hava vit bara saltað fløk.

Sum skilst, er ymiskt, hvørji virki kring landið salta fløk og flaktan fisk. Flestu virkir kunnu tó gera bæði.

Sosialurin hevur skilt, at Fiskavirking á Toftum, sum er okkara størsta saltfiskavirki, flekir tað mesta, meðan eitt nú gøtumenn serliga hava lagt seg eftir fløkum. Kósin hevur bæði flaktan fisk og fløk, meðan Vestís í Sørvági og Sammut í Klaksvík flekja. Á Vaðhorn á Strondum arbeiða teir við fløkum.

Onnur saltfiskavirkir eru eisini, sum vit ikki hava nevnt í hesum sambandi, eitt nú Sandoy Seafood á Sandi og Delta Seafood á Tvøroyri.



*– Nógv hevur verið at gjørt við virkið, og hetta hevur verið kostnaðarmikið, men nú eru vit komnir undir land. Onkrar ábøtur skulu gerast uttan, men tað er ikki tað, sum kostar teir nógvu pengarnar, sigur Háldan Haldansen*

### Keypa á uppboðssølu

Allur fiskurin, sum Farita arbeiðir, verður keyptur á uppboðssølu, og Háldan heldur, at hetta riggar óføra væl, tí her kanst tú keypa tann fisk, tú hevur brúk fyri.

– Tað eru keyparar, sum vilja hava ávísar støddir av fiski, og tá er tað heppið, at tú kanst keypa ta nøgd og ta stødd, tú hevur brúk fyri til tess at ganga ynskinum hjá kundanum á møti.

Higartil í ár hava tey skorið eini 50 tons av fiski til saltingar, og tey hava eisini pakkað fisk, sum saltaður varð fyri jól.

Haldan Haldansen hevur góðar vónir um framtíðina hjá virkinum.

At enda kann leggjast aftrat, at Farita tekur sær eisini av at selja alla framleiðsluna hjá virkinum.

Jaspis og Ametyst

## Landað í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin vóru partrolararnir, Jaspis og Ametyst, inn við tilsamans 200.000 pundum av upsa, sum teir løgdu upp til Fiskavirking í Saltangará.

Tá ið vit frættu mánamorgunin, høvdu tey 380.000 pund av upsa niðurfyri frá seinastu viku.

Tí er ikki væntandi, at Fiskavirking í Saltangará keypir meiri fisk hesa vikuna.

Í síðstu viku landaðu fleiri skip í Saltangará. Seinastur var Brestir, sum síðsta hósdag landaði heili 270.000 pund av upsa.

Og var serliga hesin fiskurin, sum lá niðurfyri mánadagin.

Phoenix og Suðringur:

## 100 tonsum hvør

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Rættiliga nógvur fiskur kom uppá land á Tvøroyri í síðstu viku, og øll arbeiðsfólkini á Fiskavirking á Tvøroyri høvdu úr at gera. Bjarni Hansen, virkisleiðari, sigur, at so nógv lá niðurfyri í síðstu viku, at tey hava nóg mikið av fiski til og við mikudagin í hesi vikuni.

### Phoenix og Suðringur

Hesa vikuna koma tveir djúpvatnstrolarar inn at landa.

- Phoenix og Suðringur koma mikudagin og hósdagin. Teir havaværntandi 200.000 pund hvør, og veiðan hjá skipunum er upsi og kongafiskur.

Tá ið vit frættu mánamorgunin, visti Bjarni Hansen ikki at siga, um aðrar landingar verða á Tvøroyri hesa vikuna.